2024

# Pensjónsaldurin

*Framrokning og greining av væntaða livialdrinum hjá fólkapensjónistum og tilmælið um broytingar í ásetanini av pensjónsaldrinum*

POUL CHRISTOFFER THOMASSEN, AKTUARUR

## Pensjónsaldurin

- *Ein greining og framrokning av væntaða livialdrinum hjá fólkapensjónistum*
- *Hvat komandi hækkingar í livialdrinum fara at merkja fyri fólkapensjónina*
- *Tilmælið til tillagingar í ásetanini av pensjónsaldrinum, so at útreiðslurnar til fólkapensjón ikki hækka ov nógv komandi árini*

Gongdin seinastu árini 15 árini vísir, at væntaði livialdurin hjá einum fólkapensjónisti er øktur munandi. í 2005 kundi fólkapensjónistar vænta at liva í 16 ár, meðan í 2020 kundu tey vænta at liva í 19 ár. í 2024 hækkar pensjónsaldurin við ½ ári. Men hetta er ikki nokk at fylgja við í økingini í væntaða í livialdrinum hjá fólkapensjónistum, sum seinastu 10 árini øktist við 0.8 ár. Livialdurin hjá fólkapensjónistum er hækkaður meira enn pensjónsaldurin, og tí økjast útreiðslurnar til fólkapensjón lutfalsliga nógv.

Vøkstur í livialdrinum síggja vit aftur í øllum Norðurlondum. Framrokningar vísa, at vøksturin heldur fram komandi 20 árini, ikki bara í Føroyum, men í øllum Norðurlondum. Tí fara útreiðslurnar til fólkapensjón halda áfram at vaksa, uttan so at pensjónsaldurin hækkar líka nógv sum livialdurin.




*Mynd 1: Væntað livitíð hjá fólkapensjónisti, 2005 – 2040, (2020 – 2040 framrokning)*

Verandi ásetingar um hækking av pensjónsaldrinum vóru samtyktar í 2018, og tá var væntaði livialdurin hjá einum fólkapensjónisti 18.5 ár (væntaði livialdurin = hvussu nógv ár í miðal hevur ein, sum er júst farin á pensjón, eftir at liva). 1. Juli 2024 hækkaði pensjónsaldurin við ½ ári, og 1. Januar 2030 hækkar pensjónsaldurin aftur við ½ ári til 68 ár. Í næsta ár skal pensjónsaldurin fyri 2035 ásetast.

Tað er umráðandi, at pensjónsaldurin hækkar í 2035, og helst við 1 ári. Hetta er hóast seinastu hagtølini frá Hagstovu Føroya vísa, at væntaði livialdurin hjá fólkapensjónistum ikki er hækkaður seinastu 2 árini. Hetta er í høvuðsheitum vegna Corona farsóttina, sum hevur økt um deyðiligheitina hjá gomlum fólki. Tí hækkar livialdurin ikki. Men er hetta bert ein fyribils ávirkan av hagtølunum. Undirliggjandi gongdin er óbroytt, og livialdurin kemur skjótt upp á sama støðið, og hækkingin fer at halda áfram.

Sum partur av hesi frágreiðing er ein framrokning gjørd av væntaða livialdrinum hjá 67 ára gomlum í Føroyum, og hon byggir bert á føroysk hagtøl. Framrokningin vísir, at vøksturin í væntaða livialdrinum hjá fólkapensjónistum fer at halda áfram komandi 20 árini, og í 2040 verður væntaði livialdurin millum 19.7 ár og 22.5 ár.  Hetta er ein vøkstur á upp til 3.5 ár komandi 20 árini. Tí mugu vit  hava eina skipan, har pensjónsaldurin hækkar, alt eftir gongdini í væntaða livialdrinum. Í dag er ein avmarking í lógini, sum sigur, at pensjónsaldurin kann ikki hække við meira enn ½ ár 5'ta hvørt ár. Men hetta er ikki nokk at fylgja við í tí hækking av livialdrinum, sum liggur í kortunum.

Skulu útreiðslurnar til fólkapensjón ikki økjast munandi, má pensjónsaldurin kunna hækkast við meira enn tí ½ árinum 5'ta hvørt ár.

Frágreiðingin vísur eisini, at tað er tørvur á øðrum tillagingum, so útreiðslur ikki økjast.

Henda greining og framrokning av livialdrinum gevur høvi til hesi tilmælið:

- Pensjónsaldurin fyri 2035 má í minsta lagi økjast við ½ árum til 68.5 ár, uttan mun til hvat seinastu útrokningar av væntaða livialdrinum vísa
- Pensjónsaldurin skal framhaldandi ásetast, so at fólkapensjónistar í miðal verða pensjónistar í 18.5 ár, men mesta markið fyri hvussu nógv pensjónsaldurin kann økjast, má hækka úr ½ til  í minsta lagi 1 ár fyri 5'ta hvørt ár
- Tá ovara markið fyri, hvussu nógv pensjónsaldurin kann økjast, hækkar til 1 ár,  má tíðarskeiðið fyri áseting av pensjónsaldri longjast, t.d. til 15 ár, soleiðis fær borgarin hóskandi tíð at tillaga seg broytingunum
- Hagtalsgrundarlagið fyri útrokning av pensjónsaldrinum má gerast størri, so at útrokningarnar geva meira støðug úrslit

8. oktober. 2024  // Poul Christoffer Thomassen, Aktuarur

## Um fólkapensjónina

Tað eru trý ting, sum avgera kostnaðin á fólkapensjónini

- Hvussu høgt er útgjaldið og mótrokning v.m.
- Hvør er pensjónsaldurin?
- Hvussu leingi kann ein fólkapensjónistum vænta at liva, t.d. hvussu leingi skal pensjónin gjaldast út?

Henda frágreiðing fer ikki at viðgera, hvussu høg pensjónin skal vera. Eg fari bert at greina pensjónsaldur og væntaða livialdurin frá fólkapensjónistum, og hvørjar avleiðingar komandi hækkingar í livialdrinum fara at hava fyri fólkapensjónina.

Væntaði livialdurin hjá einum 67 ára gomlum føroyingi sigur hvussu nógv ár, í miðal, borgarin fær útgoldið fólkapensjón. Hækkar livialdurin, men pensjónsaldurin ikki hækkar líka nógv, tá økjast útreiðslurnar til fólkapensjónina, tí hon skal gjaldast út yvir eitt longri tíðarskeið. Men um livialdurin hjá tí 67 ára gamla og pensjónsaldurin økjast líka nógv, tá er talið av árum sum borgarin, í miðal, fær fólkapensjón óbroytt. Og tá verður kostnaðurin somuleiðis óbroyttur.

Verandi áseting um pensjónsaldurin, eru at finna í §4 í Løgtingslóg um almannapensjónir. Ásetingarnar eru frá 2018, og í mun til hesa frágreiðing, er talan um 4 sentralar ásetingar, sum áseta pensjónsaldurin og hvussu pensjónsaldurin hækkar.

Stk 1: Pensjónsaldurin er í dag 67.5 ár, og hann hækkar til 68 ár í 2030

Stk 2: Pensjónsaldurin verður ásettur 5'ta hvørt ár við eini 10 ára freist

Stk 3: Pensjónsaldurin hækkar tað sama sum livialdurin, so borgarin fær 18.5 ár sum pensjónist

Stk 4: Pensjónsaldurin kann ikki hækka meira enn 0.5 ár hvørja ferð

Stk 3: Útrokningargrundarlagið er seinastu 2 ára hagtøl um livitíðina frá Hagstovu Føroya

Tá ið arbeitt verður við pensjónsskipanum eru nøkur hugtøk, sum hava stóran týdning fyri at fáa eina vælvirkandi pensjónsskipan ~~verður arbeitt við~~. Tað varð eisini tikið atlit til hesi viðurskifti, tá í verandi ásetingar um pensjónsaldurin vóru gjørdar í 2017.

**Burðadygg:** Skipanin skal vera burðadygg, so at tað verður ráð til skipanina, eisini í ringum tíðum. Tí hækkar pensjónsaldurin 5'ta hvørt ár líka nógv um miðallivitíðini hjá 65 ára gomlum, so at kostnaður ikki økist ov nógv

**Rættvísi:** Fólkapensjónin skal vera í mun til mín innsats og tað sum eg havi fortjent. Tí hækkar pensjónsaldurin ikki meira enn, at borgarin hevur rætt til 18.5 ár sum pensjónistur í miðal

**Gjøgnumskygni:** Borgarin veit í góðari tíð, hvør pensjónsaldur hansara verður, soleiðis hann kann leggja pensjónistalívið til rættis. Tí vera broytingar í pensjónsaldrinum ásettar og kunngjørdar 10 ár áðrenn hækkingina. Tá er góð tíð at leggja tilveruna sum pensjónist til rættis

**Objektivt útrokningar:** Útrokningargrundlagið skal vera gjøgnumskygt, so tað er greitt, hvussu pensjónsaldurin verður roknaður. Tí verður hækking í væntaða livialdrinum roknað grundað á almenn hagtøl frá Hagstovu Føroya

Men gongdin seinastu 15 árini og framrokningarnar vísa, at tað eru avbjóðingar við øllum punktunum !

## Hagtalsgrundarlag

Allar framrokningar av føroysku deyðiligheit og væntaða livialdrinum byggja á almenn hagtøl um andlát og fólkatal frá Hagstovu Føroyar.

Fyri at roknað væntaðu restlivitíðirnar, mugu fyrst aldurstreytaðar deyðsratir roknast. Eitt ára deyðiligheitin fyri ein x-ára gamlan sigur, hvat sannlíkindi er fyri at doyggja innan eitt ár, fyri ein sum er X ára gamal. Út frá deyðiligheitini ber til at roknað, hvat væntaða miðallivitíðin verður.

Av tí at Føroyska hagtalsgrundarlagið er so lítið, vera árini bólkað í 2 ára intervallir. Tá verða útrokningarnar meira støðugar, og úrslitini meira eftirfarandi. Eftir at aldurstreytaðar deyðsratir eru roknaðar fyri hvønn 2 ára bólk, (1985 – 1986, 1987 – 1988, o.s.fr.), kann væntaði livialdurin roknast.

Fyri at samanbera við grannalond okkara, er væntaði livialdurin roknaður fyri hini Norðurlondini. Fyri at útrokningarnar skulu vera samanberiligar, vera hagtølini í hinum norðurlondunum bólkað í 2 ára bólkar. Hetta er sjálvt um at hagstalsgrundarlagið fyri hesi lond eru stórt nokk til at nýta 1 ára bólkar. Hagtølini fyri andlát og fólkatal fyri hini Norðurlondini eru øll frá Human Mortality database (HMD).

Hagstalsgrundarlagið eru árini 1985 til 2020. Men árini 2021 og 2022 verða ikki nýtt í Lee Carter modellini. Corona farsóttin hevur ávirkað deyðiligheitina hjá gomlum fólkum. Hetta hevur skeiklað hagtølini so nógv, at tað er torført at nýta hagtølini fyri tíðarskeiðið eftir 2020. Tí síggja vit burtur frá hesum árum, og byrja framrokningina frá 2021 .

Í hesi frágreiðing kanna vit bert væntaða livialdurin hjá fólkapensjónistum, 67 ár +. Til hesar útrokningar nýtist okkum ikki at kenna deyðiligheitina hjá ungum fólki. Vit avmarkað okkum tí bert til at rokna deyðiligheitina fyri 60 ár og eldri. Tí nýta vit bert hagtølini fyri persónar sum eru millum 60 og 93. Fyri persónar yvir 93, er hagtalsgrundarlagið ov litið ( tað er skrásett ov fá andlát). Tí gera vit eina Gompert-Makeham útjavning av deyðiligheitini fyri aldrarnar 93 - 99. Hægsti aldurin í útrokningin er 99 ár.

## Modell og útrokningar

Fyri at framrokna væntaða livialdurin verður tað sokallaða Lee Carter modellið nýtt. Lee-Carter modellið er ein av mest nýttu metodum til at framrokna deyðiligheit og væntaðan livialdur.

Deyðiligheitin hækkar við aldrinum. Eldri vit verða, meira økist sannlíkindi fyri at doyggja. Men hagtølini vísa, at deyðiligheitin er lækkað seinastu árini. Samanbera vit deyðiligheitina hjá einum 60 ára gomlum persóni í 2000 við ein 60 ára gamlan í 2020, er deyðiligheitin lækkað. Tað er júst hetta sum Lee Carter modellin er góð at spáa um. Tað eru nógv modellir, sum kunnu rokna vanliga aldurstreytaða deyðiligheit, men Lee Carter modellin dugir eisini at siga, hvussu deyðiligheitin fer at lækka frameftir. Fyrimunurin við Lee Carter er, at hátturin í størri mun enn onnur modellir skilir í millum aldursbólkar,, og tí gevur Lee Carter góð úrslit.

Fyrst stig er at rokna vanliga aldurstreytaða deyðiligheit fyri hvønn 2 ára bólk, t.d. 1985-1986 ella 2011 – 2012. Hetta verður gjørt fyri allar bólkar. Síðani verður roknað, hvussu nógv deyðiligheitin er lækkað yvir árini fyri teir ymisku aldursbólkarnar. Tað er hetta, sum síðani verður nýtt í framrokningini av deyðiligheitini frá 2020 - 2024.

Talan er um eina sonevnda stokastiska framskriving. Hetta merkir, at tað vera gjørdar nógvar ymiskar framskrivingar, t.d. 10.000. Tá fáa vit eina fordeiling av, hvussu livitíðin fer at hækka. Út frá hesi fordeiling, kunnu vit finna eitt intervall, sum sigur, hvar væntaði livialdurin fer at vera. Eitt sokallað konfidensintervall. Hetta gevur okkum eina munandi betri framskriving enn bert at hava eitt miðaltal. Framtíðin er óviss, tí er tað besta, sum vit kunnu gera, er at finna eitt sannlíkt intervall fyri livialdrinum.

Av tí at henda frágreiðing bert hyggur at miðallivitíðini hjá fólkapensjónistum, framrokna vit bert deyðiligheitina og miðallivitíðina fyri aldrarnar 60 – 99.

## Væntaði livialdurin 2005 - 2020

Mynd 2 vísur gongdina í væntaða livialdrinum 2005 - 2020.




*Mynd 2: Væntaða livitíðin hjá 67 ára gomlum, kelda Hagstova Føroya*

Hagtølini vísa, at væntaði livialdurin hækkaði flestu árini frá 2005 og fram til í dag. Mynd 2 vísir eisini gongdina hjá monnum og kvinnum. Har eru sveiggini eitt sindur størri, men gongdin er tann sama.

Í 2005 var væntaði livialdurin hjá fólkapensjónisti 16.0 ár, og fram til 2020 hækkaði væntaða livialdurin við 3 árum til 19.0 ár. Hetta er uml. 1 ár fyri hvørt 5'ta ár. Hækkingin var størst í tíðarskeiðnum 2005 - 2010, tá væntaða livialdurin hækkaði við 1.7 árum. Síðani er livialdurin ikki hækkaður líka nógv. Í 2010 – 2015 hækkaði livialdurin við 0.5 ár, og í 2015 – 2020 hækkaði hann aftur við 0.7 árum.

Í 2021 hækkar livialdurin aftur, men í 2022 fellur væntaða livialdurin munandi. Hetta er vegna Corona farsóttina. Í 2022 vóru allar avmarkingar settar út gildi, og sjúkan spjaddi seg. Hetta hevði

stóra ávirkan á deyðiligheitina hjá eldri fólki. Men serfrøðingar eru samdir um, at tað er bert eitt eingangs fyribrigdi, og livialdurin kemur skjótt upp á sama støðið aftur, og fer at hækka.

Samanborið við hini norðurlondini síggja vit somu gongd seinastu 15 árini sum í Føroyum. Sí talvu 2, s. 12 Væntaði livialdurin er hækkaður umleið tað sama sum í Føroyum. Tó nakað minni í Svøríki og Íslandi, har væntaði livialdurin byrjaði á einum hægri støði. Hetta vísir, at gongdin í Føroyum er tann sama sum í hinum Norðurlondum, og Føroyar hevur somu avbjóðingar við fólkapensjónini, sum hini Norðurlondini.

***Í mun til fólkapensjónina, tá eru hesar eygleiðingar:***

Væntaða livitíðin hjá fólkapensjónistum hækkaði munandi í tíðarskeiðinum, og m.a. tí eru útreiðslurnar eisini øktar. Ein hækking av livialdrinum á 3 ár svarar til eina øking av útreiðslunum á 19%. Men hetta er ikki alt, tí vit mugu eisini hava í huga at talið av fólkapensjónistum er hækkað úr 12% av fólkatalinum í 2005  til 16% í 2020. Hetta økir eisini munandi um kostnaðin av fólkapensjónini.

Væntaði livialdurin hækkar ikki støðugt. Ávís tíðarskeið kann hann hækka meira enn onnur. Tað er einki sum týður uppá at verandi gongd fer at steðga. Heldur kunnu vit vænta, at tað fer at halda fram, men vit mugu vænta líknandi sveiggj í gongdini, sum vit hava sæð seinastu 15 árini.

Í dag kann pensjónsaldurin í mesta lagi hækka við ½ ári 5'ta hvørt ár. Tá lógin var sett í gildi, var ætlanin, at hetta skuldi tryggja, at pensjónsaldurin hækkaði líka nógv sum væntaði livialdurin. Ætlanin var, at hetta skuldi tryggja, at tá ein borgari fór á pensjón, hevði hann í miðal 18 ár eftir at liva. Men gongdin í tíðarskeiðinum 2005 – 2020 vísir, at ein hækking á ½ ár 5'ta hvørt ár er ikki nokk. Bara í 2005 – 2010 hækkar livialdurin við 1.7 árum, sum er 1.2 ár meira enn hægsta markið. Ásetingar í almannapensjónslógini um hækking av pensjónsaldrinum vóru samtyktar í 2018 og, og í 2024 hækkar pensjónsaldurin á fyrsta sinni við ½ ári. Um vit samanbera við gongdina frá 2015 – 2020, tá hækkaði væntaða livialdurin við 0.8 árum. So eru vit longu 0.3 ár aftan fyri.

## Áseting av pensjónsaldrinum 2035

Í næstum skal pensjónsaldurin fyri 2035 ásetast. Sambært §4 stk. 4 skal hækkingin roknast út frá deyðiligheitini í 2022 – 2023 . Hetta er júst tað tíðarskeiði, har Corora farsóttin hevur størsta ávirkan á deyðiligheitina.




*Mynd 3: Væntaði livialdur, 67 ár*

Mynd 3 vísir, at væntaði livialdurin er støðugt hækkaður seinastu 15 árini, og myndin vísir eisini hvussu Corona farsóttin hevur ávirkað væntaða livialdurin. Hóast fallið í livialdrinum í 2021 – 2023, eru serfrøðingar á einum máli um, at livialdurin skjótt kemur uppá á sama støðið aftur, og vøksturin heldur áfram. Um pensjónsaldurin fyri 2035 verður roknaður við støði í hagtølunum í dag, er úrslitið ein lækking av pensjónsaldrinum á 0.1 - 0.2 ár. Hetta hevði ikki verið rætt, tí talan er bert um eitt eingangs fyribrigdi. Væntaða livitíðin fer hækkar aftur, hetta fer ikki at at hava nakra ávirkan a livialdurin um 10 ár.

Niðurstøðan er tí, at ein útrokning í dag av væntaðu livitíðini ikki gevur røttu myndina. Pensjónsaldurin má hækka í 2035 við 0.5 – 1 ár, uttan mun til, hvat útrokningarnar grundað á 2023 – 2024 vísa.

## Hagtalsgrundarlagið

Føroyska hagtalsgrundarlagið er ov lítið, tað gevur stórt sveiggj í útrokningunum. I dag nýta vit sama 2 ára útrokningargrundlag sum í Danmark.

Føroyingar er fáir, og hagtalsgrundarlagið er 100 ferð so lítið sum í Danmark. Grundarlagið er so lítið, at tað kann geva tilvildarlig sveiggj í útrokning av pensjónsaldrinum. Mynd 4 vísir at observasjónirnar fyri Danmark liggja tættari at trend-linjuni, meðan í Føroyum eru útsvingini nógv størri. Tilvildarligu sveiggini í Føroysku hagtølunum kunnu hava við sær, at útrokningin gevur ein pensjónsaldur, sum er 1 ár ov høgur ella lágur




*Mynd 4: Væntaður livialdur, 67 ár, Danmark og Føroyar, trend og Obs.*

Hesi tilvildarligu sveiggj kunnu ávirka útrokningarnar. Útrokningin kann geva ein pensjónsaldur, sum er hægri enn hann skuldi vera. Út frá døminum í mynd 4, kann hetta vera heilt upp til 1 ár.

## Framrokning av livialdrinum

Framrokning av væntaða livialdrinum hjá 67 ára gomlum Føroyingum er gjørt við at nýta Lee Carter modell. Væntaði livialdurin hjá 67 ára gomlum er framroknað 20 ár, frá 2020 fram til 2040.

Framrokningin gevur ávísar tekniskar avbjóðingar fyri føroysk hagtøl, tí Føroyingar eru fáir og andlátini í hvørjum aldursbólki eru fá. Lee Carter hátturin er mentur til størri lond enn Føroyar, og tað gevur avbjóðingar, tá tað eru fá ella eingi andlát í ávísum aldursbólkum. Hetta kann gera at óvissan í útrokningunum er størri enn fyri onnur norðurlond. Sum eg havi greitt frá, eru gjørdar ymiskar tillagingar í útrokningunum, so at óvissan í tølunum verður minni. Hetta er neyðugt fyri Føroysk hagtøl, so at óvissan kann koma niður á eitt støði, har úrslitini eru eftirfarandi.




*Mynd 5: Framrokning av væntaða livialdrinum hjá 67 ára gomlum*

Mynd 5 vísur gongdina fyri væntaða livialdurin hjá 67 ára gomlum 2005 – 2020, og framrokning 2021 – 2040 av væntaðu livitíðini.

Framrokningin gevur eitt intervall fyri livialdurin, har vit realistisk kunnu vænta livialdurin fer at vera. Men allir møguleikar í intervallinum eru líka sannlíkir.

Framrokning vísir, at vøksturin í livialdrinum heldur áfram. Mynd 5 vísir intervallið fyri livialdrinum hjá einum 67 ára gomlum. Framrokning gevur eitt intervall fyri væntaða livialdrinum í 2040 millum 19.7 ár til 22.5 ár. Miðjan í intervallinum svarar til ein vøkstur á uml. ½ ár 5´ta hvørt ár. So tað er 50% sannlíkindi fyri at vøksturin er meira enn ½ ár 5'ta hvørt ár. Hágmarkið er 22.5 ár í 2040, sum er ein vøkstur á 0.8 ár 5'ta hvørt ár. Men lágmarkið er er 19.7 ár í 2040, og hetta er bert ein vøkstur á 0.2 ár 5'ta hvørt ár.

Tí er neyðugt við eina skipan til at áseta pensjónsaldurin, sum bæði kann virka, um livialdurin hækkar við 0.2 ella 0.8 árum, 5'ta hvørt ár. Bæði eru líka sannlík. Vit kunnu ikki hava eina skipan har pensjónsaldur verður ásettur ov langt fram í tíðina, tí vit kenna ikki gongdina. Talan er um at javnviga tvey mótsigandi áhugamál. Tað eina er, at pensjónsaldurin má ásetast í eitt ávíst tíðarskeið áðrenn broytingarnar komi í gildi, soleiðis at komandi pensjónistar hava tíð at tillaga seg broytingunum. Hitt er, at vit kenna ikki gongina í livialdrinum lang fram, og tí kunnu vit ikki áseta pensjónsaldurin ov langt fram. At hava eitt tíðarskeið á 15 ár verður mett at vera hóskandi. lang ,

Um útreiðslurnar til fólkapensjón ikki skulu økjast munandi, tá má pensjónsaldurin hækka líka nógv sum livialdurin. Framrokning vísur, at tað er eitt realistisk scenarie, at restlivitíðin hækkar við 3.5 ár tey komandi 20 ára, ella 0.8 ár 5'ta hvørt ár

Í dag kann pensjónsaldurin í mesta lagi hækka við 0.5 ár hvørt 5. ár, men hetta er ikki nokk at fylgja við í gongdini i livialdrinum. Um henda avmarking ikki verður tikin burtur, kann kostnaðurin til fólkapensjónina økjast munandi.

Um úrslitini av framrokningini vera samanborin við hini Norðurlondini, síggja vit somu gongd.




*Mynd 6: Væntaða livialdur, 67 ár, Norðurlond*

Sama modell og útrokningar eru nýtt í framrokningini fyri Føroyar sum fyri hini Norðurlondini. Gongdin er tann sama í øllum londunum. Allar framrokningar vísa, at væntaði livialdurin hjá ein 67 ára gomlum fer at hækka munandi komandi 20 árini.

## Broytt aldurssamanseting

Men tað eru enn fleiri avbjóðingar fyri framman. Ikki bert fer livialdurin at hækka, men fólkasamansetingin broytist eisini. Tað vera fleiri pensjónistar og lutfalsliga færri í arbeiðsførum aldri. Tí verða færri til at gjalda fyri fólkapensjónina, og tískil verður skipanin minni burðadygg.




*Mynd 7: Fólkapyramida 2020 og 2040*

## Niðurstøður

Út frá úrslitunum av framrokningini av væntaða livialdrinum hjá  fólkapensjónistum ber til at koma til fylgjandi niðurstøður, í mun til tey hugtøkini vit nevndu áðrenn:

**Burðadygg:** Ein pensjónsskipan skal vera burðardygg, so at tað vera ráð til skipanina, eisini í  ringum tíðum. Verandi skipan er ikki burðardygg, tí pensjónsaldurin hækkar ov lítið í mun til restlivitíðina, og útreiðslurnar fara at hækka.

**Rættvísi:** Fólkapensjónin skal vera í mun til mín innsats. Men framrokningin vísir, at tað er ivi um tað verður ráð til verandi fólkapensjón við galdandi skipan. Um tað er ivi, um tað verður ráð til fólkapensjón framyvir, fara fólk at seta spurnartekin við um hetta er ein rættvís skipan. Skal verandi ættarlið bæði gjalda til egna pensjón og pensjónina hjá foreldrinum?

**Gjøgnumskygni:** Borgarin má vita í góðari tíð, hvør pensjónsaldur verður, soleiðis at eg kann leggja pensjónistalívið til rættis. Men um tað verður neyðugt at hækka pensjónsaldurin við meira enn teimum ½ ár, 5'ta hvørt ár, tá má pensjónsaldurin ásetast áðrenn tey 10 árini, sum eru galdandi í dag.

**Objektivar útrokningar:** Útrokningargrundlagið skal vera gjøgnumskygt, so at tað er greitt, hvussu pensjónsaldurin verður roknaður. Men greiningin vísur, at verandi hagtalsgrundarlag er ov lítið. Hetta ger at útroknaði aldurin verður ov tilvildarligur.

## Tilmælið

Grundað á niðurstøðurnar omanfyri, koma eg við hesum tilmælum til broytingar í ásetingunum um pensjónsaldurin:

**Burðadygg**

Pensjónsaldurin fyri 2035 má økjast við 0.5 - 1 árum til 68.5 - 69 ár, uttan mun til hvat seinastu útrokningar av restlivitíðini vísa

Mesta markið fyri hvussu nógv pensjónsaldurin kann økjast, má hækka úr ½ til 1 ár fyri 5'ta hvørt ár

**Rættvísi**

Pensjónsaldurin skal framhaldandi ásetast, so fólkpensjónistar verða pensjónistar í 18.5 ár í miðal

**Gjøgnumskygni**

Tá ovara markið fyri, hvussu nógv pensjónsaldurin kann økjast, hækkar til 1 ár, má tíðarskeiðið fyri áseting av pensjónsaldri eisini hækka, t.d. til 15 ár. Soleiðis fær borgarin hóskandi tíð at tillaga seg broytingunum

**Objektivar útrokningar**

Útrokningargrundlagið má broytast, so at  útrokningarnar geva meira støðug úrslit.

Hagstalsgrundarlagið má økjast, til at nýta meira enn 5 ára hagtøl

# Talvur

| | Lámark (25%) | Miðal | Hámark (75%) |
|---|---|---|---|
| **2000** | | 15,8 | |
| **2005** | | 16,0 | |
| **2010** | | 17,7 | |
| **2015** | | 18,2 | |
| **2020** | | 19,0 | |
| **2025** | 18,8 | 19,5 | 20,7 |
| **2030** | 19,1 | 20,1 | 21,3 |
| **2035** | 19,2 | 20,6 | 21,9 |
| **2040** | 19,7 | 21,2 | 22,5 |

*Talva 1: Væntaða livitíð Føroyar, 67 ár. Árini 2021 – 2040 eru framroknað*

| | Føroyar | Danmark | Noreg | Svøríki | Ísland |
|---|---|---|---|---|---|
| **2000** | 15,8 | 14,6 | 15,9 | 16,4 | |
| **2005** | 16,0 | 15,5 | 16,9 | 17,0 | 17,5 |
| **2010** | 17,7 | 16,3 | 17,5 | 17,6 | 17,6 |
| **2015** | 18,2 | 17,2 | 18,2 | 18,2 | 18,4 |
| **2020** | 19,0 | 17,7 | 18,9 | 18,8 | 18,6 |
| **2025** | 19,7 | 18,2 | 19,4 | 19,2 | 19,0 |
| **2035** | 20,1 | 18,6 | 20,0 | 19,6 | 19,3 |
| **2035** | 20,8 | 19,1 | 20,5 | 20,0 | 19,7 |
| **2045** | 21,2 | 19,5 | 21,0 | 20,4 | 20,0 |

*Talva 2: Væntaða livitíð Norðurlond, 67 ár. Árini 2021 – 2040 eru framroknað*